Starv

# Kokkur

Við hesum verður søkt eftir kokki til Strandfaraskip Landsins, at seta í fast starv frá 1. mars 2002.

Viðkomandi skal byrja umborð á Smyrli, men skal til eina og hvørja tíð kunna verða fluttur umborð á onnur skip hjá Strandfaraskipum Landsins sum fyriskipað av leiðsluni.

Arbeiðs- og vaktarskipanin er fyriskipað í mun til galdandi ferðaætlan hjá tí skipi, ið ein er settur umborð á.

**Uppgávurnar umborð**
Høvuðsuppgávan hjá Strandfaraskipum Landsins er at nøkta landsins tørv á fólka- og farmaflutningi. Hetta verður gjørt eftir fastlagdari ferðaætlan og annars verður skipað fyri serflutningi við ferðafólki kring oyggjarnar.

Hjá Smyrli er dagliga farleiðin Tvøroyri/-Vágur-Tórshavn.

Arbeiðstíðin er eina viku umborð og síðani ein vika avspáking, og siglt verður hvønn dag í vikuni.

Umborð á Smyrli eru 18 fólk, harav hevur cateringin 2 kokkar og 4 gentur. Umstøður eru at búgva umborð.

**Starvi fevnir um**
Høvuðsuppgávan hjá kokkinum er at tryggja, at veitt verður fyritøkuni ein úrslitagóð tænasta, herundir samskipa, viðlíkahalda og menna stýringina umborð og tryggja, at bæði manning og ferðafólk eru nøgd við tænastuna. Somuleiðis hevur kokkurin ábyrgd av, at formligar reglur á økinum verða fylgdar, og at arbeiðsgongdir eru í tráð við málsetningin hjá fyritøkuni.

Aðrar høvuðsuppgávur hjá kokkinum eru at:
- Fyriskipa alt innkeyp av skipsvistum
- Tryggja ein støðugan rakstur av skipinum
- Tryggja reinføri umborð
- Tryggja at trygdin umborð er í samsvari við altjóða krøv
- Tryggja gott samstarv við myndugleikar og aðrar samstarvsfelagar.

**Førleikakrøv**
- Vinnubræv sum skipskokkur
- Prógv í nýtslu av bjargingarútgerð
- Heilsuprógv ikki eldri enn 2 ár
- Roykkavari ikki eldri enn 5 ár
- Sløkkileiðari
- Hava royndir sum kokkur við ferðamannaskipum
- Arbeiða sjálvstøðugt og hava lætt við at samstarva

**Setanartreytir**
Setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið í lønarflokki 2.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til:

**Strandfaraskip Landsins**
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 15. februar 2002, kl. 12.00.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Páll Heinesen, starvsfólkaleiðara, tlf. 34 30 00 lokal 115, ella e-post: pah@ssl.fo

*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*
*Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 150 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutnings-anleggum er 11 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

STRANDFARASKIP LANDSINS

# Tiltøk í feb. 2002

**Málningaframsýningin hjá Bjarna Sigurbjørnsson, Ísland, er í húsinum til og við 10. februar 2002.**

**Framsýningin »Farven og Lyset« hjá Lone Schmidt, Danmark er í húsinum til og við 24. februar 2002.**

**Mánadagur 04. kl. 19.30**
KLIPP, Filmsfelag Norðurlandahúsins sýnir iranska filmin »Sirkulin« frá 2000. Leikstjóri er Jafar Panahi. Filmurin snýr seg um brot hjá 8 ymiskum kvinnum í Iran í 2000

**Leygardagur 09. kl. 16.00**
»Røddir úr Norði«. Alment tiltak við Ib Michael úr Danmark, Kario Aronpuro úr Finnlandi, Tóroddi Poulsen úr Føroyum, Ole Korneliussen úr Grønlandi, Mikael Torfason úr Íslandi, Lars Saabye Christensen úr Noregi og Eva Runefelt úr Svøríki. Rithøvundarnir lesa úr verkum, sum eru í uppskot at fáa Bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins 2002. Tiltakið verður sent beinleiðis í Útvarpi Føroya

**Sunnudagur 10. kl. 15.00**
Musikk kafé í Foyerini. Magnus Johannessen spælir upp á klaver

**Týsdagur 12. kl. 19.30**
Orfeus, Tónlistarfelag Norðurlandahúsins. Konsert í Ósáskúlanum í **Klaksvík**. Hege Waldeland, selloleikari, Svøríki og Jóhannes Andreasen, klaver, fara at spæla verk eftir m.a.: Beethoven og Chopin

**Mikudagur 13. kl. 19.30**
Orfeus, Tónlistarfelag Norðurlandahúsins heldur konsert. Hege Waldeland, selloleikari, Svøríki og Jóhannes Andreasen, klaver, fara at spæla verk eftir m.a.: Beethoven og Chopin

**Sunnudagur 17. kl. 16.00**
Kunnandi fundur við ungdómum úr Noregi og Svøríki. Evnið er: »Mobilesering mot likegyldighed«

**Týsdagur 19. kl. 10.00**
Ráðstevna við evninum FAS – Føroya Altjóða Skipaskráseting. Kann henda verða eitt ískoyti til føroyska búskapin. Fyriskipari er Felagið Skipating

**Hósdagur 21. kl. 19.30**
Vetrarjazzur við »Unn Patursson Band«

**Leygardagur 23. kl. 10.00**
FSF (Fótbóltssamband Føroya) heldur aðalfund

**Leygardagur 23. kl. 14.00**
Framsýningin »Bátur og Hav« hjá Siri Gjesdal, Noreg, letur upp

**Sunnudagur 24. kl. 16.00**
Konsert »Rútmiskur musikkskúladagur«. Fyriskipari er: Føroya Musikkskúli

***Broytingar í skránni kunnu koma fyri.***
***Høvi er at keypa te, kaffi, sodavatn, øl, breyð, køkur o.a. í kaffistovuni.***
***Húsið er opið gerandisdagar kl. 10.00 -18.00 og sunnudagar kl. 14.00-18.00.***
***Kaffistovan er opin, tá ið húsið er opið.***

**NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM**
Telefon nr. 317900. Telefax nr. 319790
e-mail:nlh@nlh.fo · http://www.nlh.fo
Tekstvarp í SvF frá síðu 650

# Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Suzuki Grand Vitara 1.6
**Árg.:** 2000
**KM.:** 9.000

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Heri Weihe, sýnsmaður
tlf. 345729 · fax 345607
at hitta: mánadag-hósdag kl. 08.00-10.00
og fríggjadag 08.00-16.00

# Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Toyota Avensis 1,8
**Árg.:** 1999
**KM.:** 38.834

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Heri Weihe, sýnsmaður
tlf. 345729 · fax 345607
at hitta: mánadag-hósdag kl. 08.30-10.00
og fríggjadag 08.00-16.00

# Hús/íbúð ynskist

Vegna eitt av starvsfólkum okkara søkja vit eftir hampuliga stórari íbúð ella húsum í Tórshavn ella nærhendis.

**Bilasølan v/ Øssur Johannesen**
Tlf. 315354



# Frá Miðvágs kommunu

Søkt verður eftir einum **reingeringsfólki** til Miðvágs/Sandavágs skúla og einum til Gamla skúla at byrja sum skjótast.

Meira fæst at vita um størvini á kommunuskrivstovuni.

Umsóknir skulu verða kommununi í hendi seinast fríggjadagin 8. februar 2002.

**Miðvágs kommuna**

# Søkt verður eftir bakara

Ert tú ágrýtin og hevur áhuga í avbaking, kanst tú hjálpa til at tilrættaleggja arbeiðið og kanst átaka tær ábyrgd, kunnu vit bjóða eitt spennandi starv við framtíðarmøguleikum.

Meira fæst at vita um starvið við at ringja á tlf. 314456 ella 214456 og spyr eftir Per Poulsen.



**Sp/f Mylnan**
Berjabrekka 1
100 Tórshavn

# BÓKHALDARI
## til Griffilin

Vit sóknast eftir einum fólki, sum kann taka sær av okkara bókhaldi, ið ikki er so stórt - uml. 10 tímar um vikuna.
Ein treyt er, at tú kemur her í handilin at gera arbeiði og tú mást duga at brúka bókhaldsskipanina NAVISION.
Send okkum eina skrivliga umsókn við møguligum prógvum og tilmælum.

griffilin
SMS • TEL 310840

RK
**BÓKHALDSSTOVAN**
**hjá Regin Klargaard**
**FO-176 Velbastaður**

MvG uppgerð - roknskap v.m.

*tlf 32 81 96*
*fax 32 81 98*

# Fótbóltsvenjaraskeið – er tað nakað fyri teg?

Fótbóltssamband Føroya skipar í samstarvi við feløgini fyri grundskeiðum í fótbóltsvenjing í februar og mars 2002.

| Dagur | Skeið | Stað |
|---|---|---|
| 1. – 2. feb. | A – Byrjunarvenjing | Gøta |
| 15. – 16. feb. | B – Fysisk venjing | Toftir |
| 22. – 23. feb. | D – Teknisk venjing | Tórshavn (HB-húsið) |
| 1. – 2. mars | C – Venjarastarvið | Fulgafjørður |
| 8. – 9. mars | E – Taktisk venjing | Tórshavn (B36-húsið) |

Hvørt skeiðið er 12 tímar (vanliga fr. kl. 18-21 og ley. kl. 9-18). Neyðugt er at hava lokið skeið A – Byrjunarvenjing fyri at kunna luttaka á hinum skeiðunum. Aldursmarkið er 15 ár.

**Instruktørar:** *Bjørn Krog, Eli Hentze, Jógvan Martin Olsen og Petur Simonsen.*

**Tilmelding:** Áhugaði kunna sjálvi boða frá luttøku til FSF ella gjøgnum egið felag.

**Tilmeldingin skal vera skrivlig** (brævi, faxi ella telduposti).

Freistin at boða frá luttøku er úti 7. februar – tó er tilmeldingarfreistin fyri skeið A úti 29. januar.

FSF skilar sær rætt til at velja burtur úr, um ov nógvir luttakarar eru til okkurt av skeiðunum – í mesta lagi 24. Hvørt skeiðið er treytað av nóg góðari undirtøku – í minsta lagi 10.

**Luttøkugjald:** Skeið A 100 kr., hini skeiðini 150 kr. fyri hvønn luttakara.

Meira fæst at vita um skeiðini við at venda sær til FSF-skrivstovuna.

**Fótbóltssamband Føroya**
Gundadalur • Boks 3028 • FO–110 Tórshavn
tlf. 316707 • fax. 319079
t-postur: gudrid@football.fo

formula XEROX
ATLANTIC AIRWAYS

# Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Opel Vectra, STW, 1.8 GL
**Árg.:** 1997
**KM.:** 103.694

Bilurin verður seldur, sum hann stendur nú, og kann síggjast á bilverkstaðnum hjá Sp/f Oyri v/Tom Villi Magnussen, 900 Vágur.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Magnus E. Joensen, sýnsmaður
tlf. 373890
fax 373117
at hitta millum kl. 08[30]–10[00]

# Serskeið á Søgu- & Samfelagsdeildini

**Í vár bjóðar deildin undirvísing í hesum skeiðum:**

## Altjóða politikkur og altjóða skipan

**Lærari:** *Herluf Sigvaldsson.*
**Tíð og stað:** *Týsdagar kl. 07.50 - 09.25 á Sjómansskúlanum.*

Skeiðið er fyrst og fremst ætlað lesandi, ið eru komin nakað áleiðis í lesnaði við lærdan háskúla, og lidnum kandidatum við áhuga fyri at leggja aftrat vitan síni.

Endamálið við skeiðnum er at geva eitt grundleggjandi innlit í námsgreinina altjóða politikk. Altjóða skipanin verður í høvuðsheitum sundurgreinað við atliti at teim ymsu eindunum á altjóða leikpallinum og samvirkanini teirra millum. Høvuðstátturin í seinnu helvt av skeiðnum verður altjóða samráðing, heruppií diplomatiskar semingsroyndir. Skeiðið endar við einum samráðingarspæli.

Skeiðið fevnir um 30 undirvísingartímar, ið svara til 15 ECTS ella 1/4 lestrarár.

Undirvísingin verður ein blanding av fyrilestrum og kollokvium. Uppgáva og munnlig framløga í sambandi við undirvísingina telja 1/3 av próvtøkukarakterinum. Skeiðið endar við munnligari próvtøku, ið telur 2/3 av endaliga próvtøkutalinum.

## Grundskeið í lóg

**Lærarar:** *Kári á Rógvi, Birta Biskopstø, Jonhard Klettheyggj og Jógvan Elias Winther Poulsen.*
**Tíð og stað:** *Týsdagar og hósdagar kl. 14.00 - 16.00 á Náttúruvísindadeildini, Nóatún 3.*

Skeiðið er ætlað fólki við miðnámsútbúgving, hægri útbúgving ella viðkomandi royndum. Skeiðið er ætlað at vera partur av hægri útbúgvingum, har lógkunnleiki er ein fyrimunur.

Tey lesandi fáa ígjøgnum dømi úr lógum, kunngerðum, dómum og øðrum eina fatan av háttalagnum hjá lógkønum (juristum). Venjingar vera, har tey lesandi sjálvi sleppa at finna á lógir í bókum, teldum og hjá stovnum.

Skeiðið fevnir um 56 undirvísingartímar, ið svara til 15 ECTS ella 1/4 lestrarár.

Skeiðið er skipað í tveir høvuðspartar. Í almenna partinum læra tey lesandi, hvussu lógkøn skipa, finna, meta saman, smíða og royna lóg. Í serliga partinum fáa tey lesandi innlit í stjórnarlóg, fyrisitingarlóg og altjóðalóg, umframt einstøk onnur evni.

Tey lesandi skula skriva tvær uppgávur, sum tey fáa høvi at leggja fram. Tann betra teirra telur 1/3 av prótalinum. Skeiðið endar við skrivligari próvtøku ið telur 2/3 av endaliga prótøkutalinum.

Umsóknarfreistin er 6. februar 2002.

Umsóknarbløð fáast á www.setur.fo ella við av venda sær til

**Fróðskaparsetur Føroya**
Søgu- & Samfelagsdeildina,
J. C. Svabos gøtu 7,
FO-100 Tórshavn.
Tlf. 317009.
ssd@setur.fo